**Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð**
**Bygdarráðsfundur tann 22. juni 2023, kl. 17.00**

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 196**
Umsókn frá Umhvørvisstovuni til ummælis: umsókn um samanlegging av matr. nr. 18a og 19a.
J.nr. 104002-2-2023

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi tann 13. juni 2023 umsókn komin frá Umhvørvisstovuni til ummælis: umsókn frá Tummas Bærentsen um samanlegging av matr. nr. 18a og 19a.

Nevndin mælir til at viðmæla umsóknini.

**Viðv. 196**
Tilmæli frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt.

**Mál 197**
Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 26e soleiðis, at partur av lutinum niðanfyri Bøgøtu verður frábýttur og fær egið matr. nr.
J.nr.: 104002-1-2023

Tekniska Nevnd viðgjørdi á fundi tann 13. juni 2023 umsókn frá Bergur Strøm, Bøgøta 12, um sundurbýti av matr. nr. 26e soleiðis, at partur av lutinum niðanfyri Bøgøtu verður frá býttur og fær egið matr. nr.

Nevndin samtykti á fundi 23. mai 2023 at kanna møguleikan fyri, at kommunan kann ognast lendið.

Tekniska Deild hevur tosað við umsøkjaran og ætlaða keyparan.
Umsøkjarin sigur seg verða sinnaðan at selja lendið til Vestmanna Kommunu fyri kr. 400 fyri fermeturin.

Hetta metir nevndin vera ov mikið, og tí mælir nevndin til at viðmæla umsóknini um sundurbýti.

**Viðv. 197**
Tilmæli frá Teknisku Nevnd varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18:12

Sign.:

| | | |
|---|---|---|
| Bjørg á Rógvi | Sára Jógvansdóttir | Eyðun Hansen |
| Laila Haldansen | Anja Haldansen | Ingi Olsen |